**BÚNAÐARSTOVAN**

# Umsókn um studning til seyðakjøt

Við heimild í løgtingslóg nr. 32 frá 6. mars 2003 og kunngerð nr. 99 frá 4.november 2010 um stuðul til landbúnaðin, verður studningur latin. Stuðulin verður latin eftir umsókn. Umsókn skal sendast fyri hvønn ársfjórðing sær.

**Stuðulin er treytaður av at (sjá løgtingslóg og kunngerð á baksíðuni)**

- umsøkjarin er MVG-skrásettur
- meirvirðisgjaldið er goldið Toll- og skattstovuni
- avrit av MVG-uppgerð og kvittan verður latin saman við umsóknini.

**Stuðulin er haraftrat treytaður av at umsókn verður latin Búnaðarstovuni rættstundis.**

**Freistirnar fyri at søkja studning eru hesar:**

- fyri januar ársfjórðing skal umsóknin vera Búnaðarstovuni í hendi seinast 20.mai
- fyri apríl ársfjórðing skal umsóknin vera Búnaðarstovuni í hendi seinast 20.aug.
- fyri juli ársfjórðing skal umsóknin vera Búnaðarstovuni í hendi seinast 20.nov.
- fyri oktober ársfjórðing skal umsóknin vera Búnaðarstovuni í hendi seinast 20.feb.

**Umsóknir, sum verða Búnaðarstovuni í hendi aftaná tíðarfreistin er farin, verða ikki viðgjørdar.**

Søkt verður um studning til seyðakjøt fyri ____________________ ársfjórðing 20___

V-tal mítt er: _________________________tlf. ___________________ fax. ____________________

Navn: ________________________________________________________________________________

Bústaður: _____________________________________________________________________________

Peningastovnur: _________________________________ kto nr._________________________________

Søla av seyðakjøti henda ársfj. (MVG íroknað): kr. ______________________

MVG av seldum seyðakjøti henda árfj: kr. ______________________

**Studningur verður ikki latin av sølu av avroðum, skinnum/ull og brund- og sleppingarlombum, og skulu hesi ikki takast við í uppgerðini.**

| *Hjálagt umsóknini er:* | *Hjálagt* |
|---|---|
| 1. Ljóstak av MVG-uppgerð & kvittan | % |

**Eg vátti undir trúnaðartreytum at givnu upplýsingarnar eru sannar.**

_______________________, tann /

_______________________________
(undirskrift umsøkjarans)

## LØGTINGSLÓG NR. 32 FRÁ 6. MARS 2003 UM LANDBÚNAÐARSTUÐUL

Nr. 32 6. mars 2003

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað av árligu játtanini á fíggjarlógini at veita studning til hesi endamál: Mjólk, neytakjøt, seyðakjøt, stráfóður, súrhoysbrunnar, velting v.m., djórahald, avloysaraskipan og føroysk húsdjór.

*Stk. 2.* Studningur verður veittur eftir umsókn og er treytaður av:

1) at umsøkjari er bókhaldsskyldugur sambært § 1 B, pkt. 27 í løgtingslóg nr. 75 frá 24. oktober 1978
2) at umsøkjari er meirvirðisgjaldsskrásettur sambært løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 við seinni broytingum. Undantikið ásetingunum í nr. 1 og 2 er studningur til føroysk húsdjór.

*Stk. 3.* Landsstýrismanninum verður heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur og treytir fyri studningsveitingunum.

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 6. mars 2003

**Anfinn Kallsberg (sign.)**

løgmaður

---

## KUNNGERÐ NR. 99 FRÁ 4. NOVEMBER 2010 UM STUÐUL TIL LANDBÚNAÐIN

*Seyðakjøt*

**§ 4.** Studningur til seyðakjøt er ein heilt ella lutvís afturbering av goldnum MVG fyri seltseyðakjøt. Søkjast skal um studning fyri hvønn ársfjórðing sær, og freistin at søkja er 10 dagar aftaná, at avrokningarfreistin til TAKS er úti. Búnaðarstovan ger eina meting av játtanini í mun til væntaðar umsóknir í árinum. Endalig uppgerð verður gjørd, tá seinasti ársfjórðingur er uppgjørdur. Krevjast kann váttan fyri, at kjøtið er av tí garði, sum umsøkjarin situr við.